*Dagf. 31. mai 2023*
*HMR j. nr. 23/11472*

**Margit Stórá**
**landsstýriskvinna**

***Svar***

***upp á***

**Fyrispurningur nr. 52-106/2022 eftir § 52 a í tingskipanini um skannaran til Klaksvíkar sjúkrahús, frá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, løgtingskvinnu**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Frá hvørjum sjúkrahúsum eru limirnir í arbeiðsbólkinum, sum skal gera tilmæli um gávuna, sum Klaksvíkar Sjúkrahús fekk frá gevarum í Klaksvík og Eysturoynni?

**Svar:**

**Til spurning 1**

Sum áður boðað frá, setti sjúkrahúsleiðslan í Sjúkrahúsverkinum ein arbeiðsbólk til at orða eitt tilmæli til sjúkrahúsleiðsluna um skannaran, sum nakrir gevarar ætla at lata Klaksvíkar sjúkrahúsi. Eftir at leiðslan í Sjúkrahúsverkinum fekk tilmælið, hevur leiðslan latið landsstýriskvinnuni sítt tilmæli tann 25. mai. Sum kunnugt hevur landsstýriskvinnan, eftir at hon fekk tilmælið, alment boðað frá, at hon ynskir at taka ímóti gávuni.

Tey, sum sótu í arbeiðsbólkinum, sum leiðslan í Sjúkrahúsverkinum setti til at orða tilmælið, vóru varastjórarnir á ávikavist Landssjúkrahúsinum og á Klaksvíkar sjúkrahúsi saman við fakfólki frá Landssjúkrahúsinum innan medicoteknisk tól, radiologi, røntgen, medisinskar sjúkur og fíggjarviðurskifti. Arbeiðsbólkurin hevur eisini leita sær vitan hjá øðrum viðkomandi fakfólkum fyri at svara arbeiðssetninginum. Eitt nú hevur bólkurin fingið íkast frá serlækna innan mammakirurgi, frá serlækna í urologi, sum í nógv ár hevur verið knýttur at Klaksvíkar sjúkrahúsi, umframt frá serkønum uttanlands, sum dagliga arbeiða við MR-skanningum umframt framleiðara av 3 Tesla MR-skannara.

Heilsumálaráðið, 31. mai 2023

Margit Stórá
landsstýriskvinna